## Tolir ikki verkfall

Teir seinastu dagarnar hava samráðingar verið millum flogfelagið Sterling og flogskiparafelagið um nýggjan sáttmála, og semjast partarnir ikki, fara flogskipararnir í verkfall hósmorgunin. Sambært fjølmiðlunum er langt ímillum partarnar. Børsen skrivar í dag, at Sterling er so hart spent fíggjarliga, at felagið tolir ikki eitt verkfall. Sambært blaðnum skal leiðslan hava sagt, at varir eitt verkfall longri enn tveir dagar, fer felagið á húsagang.







# Lív má koma aft



*Borgarstjórar í Miðvágs kommunu hittast - vinstrumegin ein fyrrverandi, Martin Nielsen og høgrumegin tann núverandi, Napolion Magnussen. - Ansa eftir tí fíggjarliga partinum, sigur Martin Nielsen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**- Tað er neyðugt at fólk sleppa at byggja her, soleiðis at bygdin kann mennast enn meiri, sigur 67 ára gamli Martin Nielsen í Vatnsoyrum. Líkt er til, at okkurt fer at henda á hesum øki: Í næstum verður væntandi farið undir útstykking fyri fleiri grundøkjum í bygdini**

BYGDAMENNING

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Vatnsoyrar:** Tað er vindur og kalt uttandura, og eitt grovt kavaæl er júst farið framvið.

Hetta er ein vanligur dagur í apríl mánaði, og Sosialurin eru á vitjan í Vágum.

Skilligt er, at fá fólk hætta sær út eina slíka løtu. Men tað er kortini ein maður, sum er farin út fyri dyr henda dagin - tann nú 67 ára gamli Martin Nielsen úr Vatnsoyrum.

Hann er góður við kríatúrini, og hóast hitastigini eru stutt omanfyri frostmarkið, so mugu hesi ikki gloymast.

> *Her er einki hús bygt síðani fyrst í 80'unum. Og tað er sera harmiligt, haldi eg*

– Nei, tað verður helst nakað enn, áðrenn summarið kemur, sigur hann við einum brosi.

Við okkum í bili okkara – Snodda – hava vit ein annan mann, nevniliga Napolion Magnussen úr Miðvági.

Felags fyri teir báðar er, at tann fyrrnevndi hevur verið borgarstjóri í Miðvágs kommunu, sum eisini fevnir um Vatnsoyrar. Í løtuni er tann seinni borgarstjóri í kommununi.

### Harmilig gongd

Hóast tað er kalt í veðrinum, verður steðgað á til eitt lítið prát. Teir báðir munnu hava okkurt felags at tosa saman um.

Vit standa beint frammanfyri fyrstu húsini í bygdini, sum vórðu bygd so langt afturi sum í 1921. Og á hesum søguliga staði, skifta teir báðir orð um gamlar dagar, dagin í dag og framtíðina hjá hesi bygdini.

Vatnsoyrar er einasta føroyska bygdin, sum ikki hevur atgongd til havið. Samstundis liggur størsta vatnið beint við bygdina - Sørvágsvatn.

Millum hvøssu kavaælini henda dagin í apríl mánaði, kann Martin skoða rundan um seg í bygdini - og hann kann staðfesta bæði lív og naggatódn í heimbygdini.

Í bygdini liggur eitt stóra virkið H-dygd, sum framleiðir bæði vindeygu og hurðar til føroyska marknaðin. Samstundis við hesa menningina, kann Martin kortini stutt staðfesta:

– Her er einki hús bygt síðani fyrst í 80'unum. Og tað er sera harmiligt, haldi eg, sigur hann við Napolion.

### Búseta seg aðrastaðni

Tørvur hevur verið á grundøkjum, men tað hevur altso ikki eydnast kommununi at útvega fólki øki her í bygdini.

– At ein kommuna kann útvega fólki grundøki, betýðir ómetaliga nógv fyri eina bygd sum okkara.

– Tí mugu vit bara staðfesta, at fólk hava búsett seg aðrastaðni, hóast tey so inniliga høvdu viljað bygt her í Vatnsoyrum, sigur fyrrverandi borgarstjórin ikki sørt harmur á málinum.

Millum hesi teljast tveir synir hansara, sum eftir øllum at døma høvdu viljað bygt her.

Fólkatalið í bygdini hevur helst eisini verið merkt av hesum tørvinum: Í 1985 - stutt eftir at seinastu húsini vórðu bygd - búðu 62 fólk í bygdini og í 2003 bert 39. Hin 1. februar í ár talið tó komið uppá 54.

Hinvegin so verður fólkatalið í bygdini fleirfaldað, tá legur og onnur tiltøk verða hildin í leguhúsinum Zarepta, sum Brøðrasamkoman bygdi í 1967.

### Lív í

Napolion greiðir frá nøkrum av teimum ætlanunum, sum kommunan er í holt við í løtuni.

Her er talan um ætlanir, sum eisini fevna um bygdina, vit eru staddir í, m.a. við kloakk og vatngóðsku.

Fleiri viðurskifti eru fingin uppá pláss, meðan onnur